Tvey norsk frálandsskip við bryggju í Havn. Eitt triðja ligur fyri akkeri á Nólsoyarfirði. Mynd Jan Müller/oljan.fo

Fleiri norsk frálandsskip komin til Føroya

Jan Müller

08.10.2015 - 09:05

Oljan.fo

Ikki færri enn trý norsk frálandsskip eru komin til Føroya í hesum døgum at skifta manning, bunkra, proviantera og fáa smærri umvælingar gjørdar umframt at kunna liggja fyri akkeri á føroyskum firði, meðan bíðað verður eftir nýggjum arbeiðsuppgávum. Eftir øllum at døma eru Føroyar, tvs. føroyskar fyritøkur og havnir kappingarførar við norskar og aðrar, nú frálandsvinnan hevur truplar dagar.

Tað er ikki ókent, at útlendsk frálandsskip við jøvnum millumbili seta kósina móti Føroyum og leggja at landi her fyri at skifta manning og keypa ymsar vørur og tænastur. Tað er eisini í tráð við eitt dreymaynski hjá føroyskum veitingarfyritøkum, at hetta gjørdist meira støðugt og ein fastur partur av vinnuvirkseminum her á landi. Longu í 90-unum royndi Menningarstovan við so frægum monnum sum Kjartan Kristianssen, stjóra og øðrum góðum fólkum at marknaðarføra Føroyar sum ein tænastu- og sjóvinnudepil í Norðuratlantshavi tvs. eitt stað, har útlendsk reiðaríir kundu fáa tørvin hjá teirra skipum nøktaðan. Síðani oljuøldin av álvara tók dik á seg, bæði í norskum sjógvi og í okkara bretska grannalag, og í kjalarvørrinum á leitiboringum í føroyskum øki, hava føroyskar fyritøkur førleikament seg til at kunna gerast partur av altjóða oljuumhvørvinum.

Og á oljumessuni í Aberdeen herfyri fór so verkætlanin “Ein føroyskur sjóvinnudepil í Norðuratlantshavi” av bakkastokki. Har tóku føroyskar veitingarfyritøkur til sjóvinnuna saman hendur og bjóðaðu seg fram fyri altjóða oljuídnaðinum.

Hetta kom ikki minst í kjalarvørrinum á, at ein risastórur boripallur fyri fyrstu ferð kom inn á Skálafjørðin at verða umvældur. Hann var so hæddarpunktið í royndunum at fáa útlendsku oljuvinnuna at síggja Føroyar sum eitt land, har skip og pallar í frálandsvinnuni kunnu fáa tænastur á kappingarførum støði.

Í dag kann sigast, at enn eitt kapittul er skrivað í hesi spennandi søgu. Ikki færri enn trý norsk frálandsskip liggja um sama mundið við bryggju í Havn og fyri akkeri á Nólsoyarfirði. Tey eru øll komin úr Barentshavinum til Føroya at skifta manning, bunkra, proviantera og at fáa smærri umvælingar gjørdar – umframt og tað er ikki minst áhugavert fyri “føroysku sakina” at fáa akkers- ella keipláss, meðan bíðað verður eftir nýggjum arbeiðsuppgávum. At

ikki færri enn trý norsk frálandsskip koma til Føroya setir nógvar ringar í sjógvin. Arbeiði er eisini til hýruvognar, gistingarhús, flogfelag oo.

Polar Empress er millum heimsins fremstu seismikkskip og hevur til nú arbeitt í Barentshavinum saman við tveimum hjálparskipum. Nú tá arbeiðsuppgávan er lokin gjørdi útgerðarfelagið Dolphin Geofysical av at lata øll trý skipini fara til Føroya at skifta manningar, bunkra, proviantera, fáa smávegis umælingar gjørdar og síðani at verða liggjandi her, til tey aftur fáa uppgávur.

Sum oljan.fo skilur, so fara tey trý skipini, hvørs umboð er Faroe Ship, at liggja í føroyskum sjógvi í einar tvær vikur, at byrja við við kei í Havn, síðani fyri akkeri í Nólsoyarfirði og hareftir fyri akkeri inni á Skálafjørðinum.

Umframt flaggskipið Polar Empress eru eisini hjálparskipini Sanco Sky og Seven Stars. Orsøkin til at tey hava í hyggju at enda á Skálafjørðinum er helst tann, at tey kenna seg mest trygg har.

Tað hevur ikki eyndast oljan.fo at fáa orð á hvørki umboð í Føroyum ella útgerðarfelag í Norra. Men sum skilst, so er avgerðin hjá Dolpin í Norra at lata skipini koma til Føroya tengd at, at tað loysir seg betri fyri felagið. Vørur og tænastur her eru rætt og slætt bíligari. Eisini vísir tað seg at vera høgligari at koma til Føroya, tá hugsað verður um manningarskifti og okkara rutusambond til umheimin. Ein stórur partur av manningunum kemur úr Asia.

Hvussu og ikki so verður tað spennandi at fylgja við, hvussu verður við teimum hundraðtals frálandsskipunum, sum liggja fyri teym og ongar arbeiðsuppgávur hava. Kunnu Føroyar koma at gagna teimum í bíðitíðini og øvugt!

Seinasta: 9. oktober

Viðmerking frá Dolphin

Loksins eyndaðist tað at fáa eina viðmerking frá Dolphin, sum hevur reitt út og leigað tey trý frálandsskipini, sum liggja á Nólsoyarfirði og á Skálafjørðinum. Atle Jacobsen, kunningarstjóri sigur við oljan.fo, at nú uppgávan hjá Polar Empress vestan fyri Hetland (og ikki í Barentshavinum, sum oljan.fo hevur fingið at vita áður) var lokin og skipið er ávegis í Barentshavið, hildu teir tað vera skjótast at leggja inn í Føroyum at skifta manningar og fáa ymsar vørur og tænastur. Hann vil ikki gera viðmerkingar til, hví teir ikki heldur eru farnir í norska havn, men viðgongur, at føroysku tænasturnar eru ikki dýrari enn tær í Norra. Teir eru annars væl nøgdir við tænasturnar í Føroyum. Hann veit ikki, hvussu leingi skipini koma at liggja her. Men Førpyar vóru so nærmasta staðið at fáa umrøddu tænastur, og tí eru skipini her. Talan er um eitt sera nútímans seismikkskip og so tvey hjálparskip.